# Karsten syfti Heina úr løgtinginum



*Karsten Hansen smeyg sær hesaferð fram um partamannin Heina O. Heinesen og vann harvið innahýsis dystin um løgtingssessin í Norðoyggjum*

**Karsten Hansen gjørdist vinnarin av innahýsis dystinum í Tjóðveldisflokkinum í Norðoyggjum. Hann dró longra stráðið í kappingini við Heina O. Heinesen, sum fall eftir nærum 20 ár sum tingmaður**

ÚTSKIFTING
*Eyðun Klakstein*

Stóri stríðsmaðurin fyri útróðrarmonnum í Norðoyggjum fall á valinum týsdagin.

Heini O. Heinesen, sum hevur havt 20 virkin ár í landspolitikki, mátti lúta fyri fyrrverandi landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Karsten Hansen, tá ið føroyingar settu krossarnar fyrradagin.

Dysturin millum Karsten og Heina gjørdist eyðsýntur á seinasta valið, tá ið Karsten hevði verið landsstýrismaður í fýra ár. Ta ferðina gjørdi Karsten einki við Heina, men hesaferð bragdaði.

– Eg eri ótrúliga glaður fyri valúrslitið. Flokkurin stóð seg betur, enn tey flestu høvdu roknað við, og eg fekk eitt gott persónligt val, sigur Karsten Hansen

– Øll roknaðu vit, at vit fóru at verða teir stóru tapararnir á valinum, men fyri einaferð skyld vendi tað rættan veg hjá okkum. Eg fegnist um, at veljararnir í Norðoyggjum hava stuðlað mær so væl, men vit mugu ikki gloyma tað stóra arbeiðið, sum Heini O. Heinesen hevur gjørt fyri flokkin.

## Vent á høvdið

Á løgtingsvalinum í 1998, tá ið rættiligt fullveldisrák var í føroyskum politikki og Tjóðveldisflokkurn stóð sterkur í myndini, hevði Heini O. Heinesen eitt gott persónligt val við 514 atkvøðum. Tá fekk Karsten Hansen, sum framvegis var ókendur í landspolitikki, 146 atkvøður.

Fýra ár seinni – í 2002 – var munurin nógv minkaður. Heini fekk 329 atkvøður, meðan Karsten bardi seg upp á 283. Eftir at Karsten hevði verið í miðdeplinum í føroyskum politikki, var spenningur um, hvørt hann fór at taka sessin hjá Heina, men hann snávaði.

Karsten helt fram sum landsstýrismaður við fíggjarmálum, og nú hevur hann fingið størri undirtøku enn nakrantíð.

Á valinum týsdagin leyp Karsten upp í 303 atkvøður, meðan Heini mist stívliga hálvthundrað atkvøður og endaði á 275 persónligum atkvøðum. Harvið smey Karsten sær fram um partamannin í Norðoyggjum.

## Nógv ár í politikki

Yrkisleiðin hjá Heina O. Heinesen í politikki byrjaði í 1962, tá ið hann sum 24 ára gamal varð valdur í bygdaráðið í Kunoy, og síðani 1977 hevur hann verið bygdaráðsformaður. Í 1984 kom Heini fyrstu ferð í løgtingið, og har hevur hann sitið síðani. Hann hevur røkt nógvar álitissessir, hóast hann ikki hevur verið landsstýrismaður. Hann hevur eitt nú verið formaður í Tjóðveldisflokkinum og formaður í landsstýrismálanevndini og vinnunevndini hjá løgtinginum.

Hetta er fyrstu ferð, at Karsten Hansen er valdur í løgtingið, men hann hevur verið virkin politikari í nógv ár. Hann hevur sitið í býráðnum í Klaksvík og var í nøkur ár varaborgarstjóri hjá Jógvani við Keldu.

Karsten hevur seinastu seks árini røkt starvið sum landsstýrismaður við fíggjarmálum, og tað hevur rættiliga sett hann í andglettin í føroyskum politikki.

## Karsten fram í oddan

Karsten Hansen hevur verið førdur nógv fram í valstríðnum hjá Tjóðveldisflokkinum, samstundis sum Heini O. Heinesen hevur havt ein meira avmarkaðan leiklut.

Har ið Karsten ikki hevur verið sjálvur við í kjaki, hevur hann ofta verið nevndur í kjakinum sum landsstýrismaðurin, ið situr tung á landskassanum, og bæði formaðurin í Tjóðveldisflokkinum og onnur hava støðugt nevnt Karsten Hansen í valstríðnum.

– Eg havi havt hóming av, at Tjóðveldisflokkurin hevur brúkt meg nógv í valstríðnum, og hóast fólk við góðari útbúgving hava roynt at vent fíggjarpolitikkin og búskaparstøðuna í landinum á høvdið, so hava fólk ikki góðtikið tað. Veljarin er ikki býttur, sigur Karsten Hansen.

Hann dugir ikki at meta um, hvørt tað verður broyting í tjóðveldisumboðanini fyri Norðoyggjar, nú hann er komin á ting.

– Eg havi tikið undir við nógvum av sjónarmiðnum hjá Heina, og tað er umráðandi at vit hava eina greiða støðu mótvegis okkara høvuðsvinnu. Eg veit ikki, um tað verður nøkur broyting, nú eg skal í løgtingið fyri Heina, men fyrst mugu vit síggja, hvat kemur burturúr nú eftir valið, og hvønn leiklut eg og flokkurin skulu hava, sigur Karsten Hansen.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá Heina O. Heinesen fyrrapartin í gjár, men hann var ikki til at fáa fatur á.



# Fýra atkvøður millum Jógvan og Jákup

**Tá endaliga úrslitið úr norðoyggjum var greitt, vóru einans fýra atkvøður á muni millum næsta og triðja mannin hjá Fólkaflokkinum. Jógvan við Keldu fekk 198 atkvøður, og Jákup Mikkelsen fekk 194**

LØGTINGSVAL 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*





**Klaksvík:**
– Mín støða er nakað serlig í hesum førinum, tí eg eri fallin tvær ferðir fyrr uppá tvær atkvøður, men kortini so haldi eg ikki, at eg eri bangin fyri at detta út hesuferð, sigur ein bjartskygdur, men varin Jógvan við Keldu.

Hann var næstvaldur á lista A eftir Anfinn Kallsberg, sum setti met við sínum 819 atkvøðum.

Jógvan hevði tó eina afturgongd í atkvøðutali, men tað heldur hann kemur av, at Anfinn fekk so dygga undirtøku.

– Tað eru fleiri orsøkir til, at Anfinn fekk so dygga undirtøku. Ein er, at hann er ein kendur og dugnaligur politikari, ein onnur er viðferðin sum hann fekk av hasi bókini og allar fylgjurnar og tað triðja er uttan iva sympatiatkvøður, sum hann hevur fingið av somu orsøk. Og tað gekk so millum annað út yvir meg á hesum valinum, sigur Jógvan við Keldu.

Tað hevur afturvaldi tingmaður Fólkafloksins í norðoyggjum tó ongar trupulleikar av, og hann fegnast sum vera man um, at hann varð afturvaldur.
Tá prátið fellur inn á møguligar samgongur, so sigur hann, at møguleikarnir eru nógvir. Hann heldur tó, at tað var hart framsett av formonnunum í Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum, tá teir á formansrunduni beint eftir valið søgdu, at hvørgin flokkurin fer í samgongu við Fólkaflokkin um ein landsstýrismaður ella løgmaður eitur Anfinn Kallsberg.

– Tað er óklókt av teimum at vera so avgjørdir hasum viðvíkjandi, tí tá avtornar, so kundi tað verðið, at teir fara at bakka, sigur Jógvan við Keldu, tinglimur hjá Fólkaflokkinum í norðoyggjum.

## Gott val

Triðji maður á listanum hjá Fólkaflokkinum í norðoyggjum, Jákup Mikkelsen, sigur, at hann er vælnøgdur við persónliga úrslitið og samlaða úrslitið hjá flokkinum, sum gekk fram í norðoyggjum.

– Eg hevði varðhugan av, at valið fór at verða gott fyri flokkin, men persónliga er tað altíð trupult at vita, hvussu tað fer at ganga, sigur Jákup Mikkelsen, sum ikki heldur, at tað er óhugsandi, at ein landsstýrissessur hjá Fólkaflokkinum verður í norðoyggjum, um flokkurin kemur í samgongu.

Jákup Mikkelsen hevur onga aðra viðmerking til tað, sum Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard søgdu viðvíkjandi Anfinni og samgongumøguleikunum hjá Fólkaflokkinum enn, at fólkið hevur talað, og at tað átti at verðið virt.

# Ongin ósigur

**Hóast landsúrslitið fyri Sambandsflokkin ikki var so gott, so heldur toppskorarin í norðoyggjum Bjørn Kalsø ikki, at valið kann kallast ein ósigur fyri flokkin, tí hann gekk knappar 100 atkvøður fram í norðoyggjum**

LØGTINGSVAL 2004
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Hóast Sambandsflokkurin ikki fekk ein mann inn, so var kortini talan um eitt gott val hjá flokkinum í norðoyggjum. Stóri atkvøðuslúkarin hjá flokkinum var Bjørn Kalsø, sum fekk 192 atkvøður. Hetta er fyrstu ferð, at Bjørn hevur stillað upp til eitt løgtingsval, og hann er bilsin av stóru undirtøkuni, sum hann fekk.

– Eg eri sera bilsin, tí eg hevði væntað, at tað fór at verða tættari milllum valevnini, sigur Bjørn.

Hann heldur, at hóast landsúrslitið fyri flokkin ikki var serliga gott, so sær tað gott út fyri Sambandsflokkin í norðoyggjum út frá úrslitunum týskvøldið, og tí skýrir hann ikki úrslitið sum ein reinan ósigur.

– Flokkurin gekk fram við knapt 100 atkvøðum í norðoyggjum, so tað er eitt greitt tekin um, at her er nakað at byggja víðari uppá hernorðuri, sigur Bjørn Kalsø.

Tosað varð annars um áðrenn valið, at hann heilt stóri atkvøðuslúkarin frá løgtingsvalinum í 2002, Magni Laksáfoss, helst fór at fáa nógvar atkvøður aftur hesuferð. Men Magni Laksáfoss endaði við sínum 80 atkvøðum á triðja plássi aftan fyri Bjørn og John Kára Jacobsen.

Hetta heldur Bjørn kann koma av, at Magni ikki býr í norðoyggjum.

– Klaksvíkingar eru so lokalir, so eg trúgvi, at tað at Magni býr í Eysturoynni hevur gjørt sítt til, at hann gekk aftur, sigur Bjørn, sum takkar fyri álitið, sum hann persónliga og flokkurin fingu í norðoyggjum.

Hann dugir illa at siga, hvør orsøkin er til, at hann fekk so nógvar atkvøður, men Bjørn er rímuliga kendur í norðoyggjum frá ítrótti, og so er hann fólkaskúlalærari til dagligt.

– Eg veit ikki, hvat fólk velja eftir, og eg havi ikki gjørt so nógv við tað persónliga valstríðið, men havi sjálvandi fingið nakrar møguleikar frá flokkinum í til dømis í sjónvarpinum, sigur Bjørn, sum viðgongur, at góða úrslitið týskvøldið hevur givið honum blóð upp á tonnina.

*Bjørn Kalsø heldur ikki, at løgtingsvalið var ein fullkomin ósigur hjá sambandsflokkinum, sum fekk framgongd í hansara valdømi, norðoyggjum*

